

## Leivur Ejdesgaard til minnis

Við Koyriveg og Kvíggjarfoss
situr tú Leivur og lurtar og hyggur.
Sælar eru løtur við kvørkveggju ljóði
um teig og tún,
við duni og sjói úr fossi
og tutli úr vatnræsum smáum,
og rungandi fjallamáli
av Eggini og Knúki,
úr klettagjáum
og veðurbrýndum steinum,
úr Múlatindi í Rustakamb
í sólfyltum summartámi.

Aldudrátt hoyrdi tú
av brimskornum tangum
frá Stong inn á Stórasand.

Eygu tíni sóu gyltar oyggjar
í sólarrenning
og sólsetri
av Høgabakka í Flatnatanga.
Sjósavan
blankaði sær
í Djúpinum
á bráandi seiðalygnum,
undir Rókum
við Víkarboga,
norður á Barm´
og við hvønn eygnahvarm
í feitum sjógvi -
settur av tangi og tarabløðum.

Hóast eygu tíni sóu,
run við Stong og Nestanga
í sólfyltum summaranga
og vetrarbrim
upp í sovandi grasstrá seg manga, -
so ljóðar: Eingin skal um sín dag ganga!

Av Marknagili komst tú -
tøtlaði um ong og teig
á hesi leið.
Mangan gekst tú oman í Sjóvartún
og var tín hugaheimur her:
Tín málningatalva -
ovast uppi frá
til dymbuldaga altartalvu
av Eckersberg í kirkju -
við Jesusi í Getsemane.

Her lá tú undir hvítum loki,
undir døkkari altartalvu
við Jesusi millum myrkar greinar
og sovandi sveinar
eina skamma stund
í svartari lund.

Brimgangur var Undir Rókum.
Hjómhvítur dráttur
var um Áarsker,
Sílatanga og Høgnaboga.
Hóast hesa sjóvarilsku-
var friður í Getsemane.

Sjómaður av Marknagili
í Sjóvartún -
her var tín heimur,
tín verð -
títt Getsemane.

**Frits**

## Viðmerking:

*Sjálvstýrislógin:*

# Tann virðiliga, greiða og trygga loysnin

Tað ber til betri at loysa ógreiðurnar í ríkisrættarspurninginum og fáa føroyingum allar heimildir, uttan at gera ríkisrættarligt skammlop.

Tá Javnaðarflokkurin setti sjálvstýrislógina á skránna, var tað ikki minst, tí flokkurin sá, at eitt alt meira samansett og fjøltáttað samfelag hevði tørv á greiðum ábyrgdar- og valdsbýti. Tað var t.d. greitt, at tað ikki bar til at allur føroyski fíggjarheimurin var danskt ábyrgdarøki, sum føroyskir myndugleikar lítið og onki innlit høvdu í.

**Greið ábyrgd**

Tí skal ein komandi sjálvstýrislóg staðfesta, at ongar avmarkingar eru fyri, hvørji mál og málsøki kunnu leggjast - endaliga - undir føroyskt ræði.

Tá Føroya Løgting hevur avgjørt, at nú er eitt málsøki føroyskt, skal hetta bert boðast donskum myndugleikum - og so er málsøkið føroyskt. Tá hava vit alla ábyrgd av málsøkinum - fyrisitingarliga og fíggjarliga. Og ein føroyskur landsstýrismaður hevur, við ráðharraábyrgd sambært stýriskipanarlógini, fyrisitingarliga myndugleikan um hendi. Ábyrgd og vald liggja í Føroyum, uttan snøklar ella lepar.

Verða fyrisitingarlig brot framd, er tað ein føroyskur landsstýrismaður, ið skal ábyrgdast.

**Greitt valdsbýti**

Tá Løgtingið hevur avgjørt at leggja eitthvørt málsøki undir føroyskt vald, er tað bara Løgtingið, ið hevur lóggávuvaldið á økinum. Bara føroyskt embætisverk skal um- og fyrisita øki og bara føroyskt lógarverk skal galda á økinum.

**Væl fyrireikað**

Sjálvstýrislógin gevur soleiðis føroyingum allar heimildir at leggja eitt og hvørt málsøki undir føroyskt ræði, og gevur okkum heimild sjálvi at avgera, hvussu skjót og hvussu víttgangandi sjálvstýrismenningin skal vera. Tá vit halda, at vit hava fíggjarliga og - ikki minst - umsitingarliga førleikan at taka eitt málsøki, tá gera vit tað. Hetta gevur okkum stundir at fyrireika hvørja yvirtøku væl og virðiliga. At greina eitt málsøki í senn, seta tað í samanhang við onnur og kanna, hvussu tað best kann leggjast til rættis eftir okkara fyritreytum. Soleiðis at vit, tá vit yvirtaka, eru vís í at vit fáa eina skipan, ið hóskar til føroysk viðurskifti og sum føroyskir myndugleikar á tryggan hátt kunnu fyrisita.

**Ongin ivi**

Eftir sjálvstýrislógini er sostatt ongin ivi um, hvør hevur evsta vald og evstu ábyrgd á hvørjum einstøkum málsøki. Tvørturímóti eru krystalgreiðar linjur á hesum øki: Tá vit hava boðað frá, at nú er eitt málsøki føroyskt, ja, so hava føroyskir myndugleikar einsamallir ábyrgdina og valdið.

Har er onki hálvt.



Hetta er ein virðilig loysn, sum veitir okkum veruligt sjálvstýri, afturímóti ríkisrættarliga skammlopinum hjá samgonguni við formellari loysing og afturdelegering.

**Veruligt sjálvstýri og veruligt sjálvræði**

Bara sjálvstýrislógin kann tryggja okkum veruligt sjálvræði í okkara egna landið. Tí er hon besta og einasta loysnin.

**Bergur P. Dam**

# IN ENGLISH, PLEASE!

Í sambandi við at Norðurlandahúsið í síðstu viku hevði vitjan av enska útgevaranum Pamela Clunies Ross, skipaðu Rithøvundafelagið og Norðurlandahúsið fyri rithøvundakvøldi við fyrilestri, upplestri og tónleiki. Tiltakið, ið var alment, var í Klingruni í Norðurlandahúsinum týskvøldið 29. februar.

Millum áhoyrarnar var eisini enski gesturin og útgevarin, sum, hóast hon valla hevur skilt nógv av tí, ið lisið var, óivað kortini hevur fingið eina mynd av tí nýggjasta í føroyskum bókmentum. Sum útgevari í Englandi hevur Pamela C. Ross sett sær fyri at geva út nýggjan íslendskan prosaskaldskap, og hevur forlag hennara, Mare's Nest, tey seinnu árini givið út fleiri av teimum nýggjastu íslendsku skaldsøgunum, eitt nú bøkur eftir Thor Vilhjálmsson, Einar Már, Vígdis Grímsdóttur, Guðberg Bergsson og Ólaf Gunnarsson.




Turið Sigurðardóttir legði fyri við stutt at geva eina lýsing av føroyskum bókmentum í dag. Tey, ið síðani lósu upp úr egnum skaldskapi, vóru: Jens Pauli Heinesen, Oddvør Johansen, Carl Jóhan Jensen, Hanus Andreassen, Jóanes Nielsen og Rakel Helmsdal.

Um tað var av tilvild ella ikki, so vísti tað seg at fleiri av høvundunum høvdu valt at lesa upp tekstir, ið snúðu seg um tað at skapa og skriva. Sjálvur haldi eg hetta vera mikið áhugavert, og tað gjørdu kanska eisini øll tey, ið sótu og lurtaðu í Klingruni. Men spurningurin er, um ikki hetta gjørdist í so einstáttað evni at lurta eftir í næstan hálvantriðja tíma.

Jens Pauli Heinesen spurdi: Hví skrivar tú? Oddvør Johansen sat uppi á atelierinum saman við Augusti Benadiktson, og meðan tey bíðaðu eftir íblástri, spurdi tey hvaðani inspiratiónin kom.

Carl Jóhan Jensen las um "jarðtekn ið ikki krevja orð". Og í sínum heilt egna stíli bað Jóanes Nielsen okkum ikki taka seg illani upp, tí hann yrkti eisini "fyri gullfiskunum, mánalýsinum og fyri øllum seymunum, ið halda takplátunum upp á pláss". - Nei, løtan var á ongan hátt keðilig.

Tvær ferðir inn ímillum tók vísusangarin Hanus Johansen og riggaði mikrofonina betur til. Hann sang tvær yrkingar um várið, onnur var eftir Karsten Hoydal og hina hevði Ata í Líð skrivað, og eisini sang hann týðingina hjá Rikard Long Úr Rubaijat. Til allar yrkingarnar hevði Hanus Johansen sjálvur gjørt løgini. Sum tann einasti av luttakarunum treiv Hanus í tað enska, og framførdi meistarliga yrkingina Annabel Lee eftir Edgar Allan Poe.

Umframt Oddvør vóru tað Hanus Andreassen og Rakel Helmsdal, ið lósu prosa. Søgurnar tey bæði lósu vóru av heilt øðrum slag enn tað, vit hoyrdu hini lesa, so her var ið hvussu er ein roynd gjørd at skapa vídd í innihaldinum. Av áhoyraraplássunum sást tú yvir á Nestorin í føroyskum skaldskapi í dag, Regin Dahl. Hann var komin at lurta eftir hinum.

Hetta var ein frálík løta í Klingruni. Og sum hjá Augusti Benadiktssyni so runnu tankarnir bæði niðan á Dalavegin og niðan á Varða, og teir steðgaðu eisini á við ta nýggju reglugerðina fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings. Vónandi verður hon so smidlig, at grunnurin í framtíðini fer at taka hædd fyri at føroyskar bókmentir verða týddar til onnur mál í størri mun enn gjørt verður í dag.

Vónandi er enski útgevarin farin avstað aftur, um ikki beinanvegin, við einum føroyskum Einari Már Guðmundssyni, Vígdis Grímsdóttur ella Guðbergi Bergssyni, so við einum boði upp á, hvussu vit bera okkum at við at fáa nýggjar føroyskar bókmentir fluttar beinleiðis úr føroyskum yvir í eitt av heimsins størstu tungumálum, - og her mugu vit sjálv eisini virka og stuðla. Norðurlandahúsið hevur tikið fyrsta stigið - og tað eiga tey stóra tøkk fyri.

**Martin Næs**



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Nú hava vit aftur eitt A-landslið

*Mong vóru tey, sum fegnaðust, tá tað frættist, at nú skuldi aftur koma gongd á landsliðsarbeiðið hjá HSF. Fyrsta styrkisroyndin hjá nýggja landsliðnum var um vikuskiftið, og dystirnir móti Grønlandi prógvaðu, at tilfarið til eitt gott landslið so avgjørt er til staðar*

JÁKUP MØRK

Tað vóru gleðiboð, tá tað um ársskiftið frættist, at nú fór aftur ferð at koma á landsliðsarbeiðið hjá Hondbóltssambandinum, soleiðis at vit nú aftur kundu fáa eitt A-landslið, sum skuldi umboða Føroyar í altjóða høpi.

**Grønland fyrsta royndin**

Helst vóru tað fleiri, sum leitaðu aftur til sjeyti- og áttatiárini, tá føroyska landsliðið luttók í C-HM kappingunum.

Síðani tá eru stórar broytingar farnar fram á ítróttarliga økinum her heima. Fótbólturin hevur í stóran mun yvirtikið leiklutin hjá hondbóltinum, tá tosið fellur á altjóða luttøku, og í dag munnu tað helst vera fleiri, sum kenna til Føroyar orsakað av fótbóltinum, heldur enn hondbóltinum.

Veddingarpengarnir frá ÍSF hava tó gjørt tað gjørligt hjá HSF at fara undir eitt miðvíst landsliðsarbeiðið, og fyrsta royndin í hesum sambandi var so um vikuskiftið, tá grønlendska landsliðið kom á vitjan hjá okkum.

**Passalig styrki**

Tríggir dystir skuldu leikast, og sum kunnugt endaði tveir teirra við føroyskum sigri, meðan triði dysturin endaði við javnleiki.

Leikliga var hetta helst eitt hóskandi mótstøðulið, hóast tað serliga í næsta dystinum var líkt til, at grønlendska liðið var ov veikt til føroyingarnir. Grønlendska liðnum væntaði tó nakrar av týdningarmestu leikarunum, og tað var eisini sjón fyri søgn, at triði dysturin landanna millum var nógv javnari, serliga tí Jacob Larsen, sum dagliga leikar við GOG, var komin upp til henda dystin.

**Væl nøgdur formaður**

Eftir dystin sunnudagin í Vestmanna hittu vit formannin í Hondbóltssambandinum, Petur Ova Joensen, og spurdu vit hann, hvussu teir í HSF vóru nøgdir við tiltakið.

Samanumtikið var formaðurin sera væl nøgdur við byrjanina til nýggja landsliðstíðarskeiðið. Serliga legði hann dent á ta orku og tann vilja, sum leikararnir sjálvir høvdu lagt í fyrireikingarnar. Eisini legði hann afturat, at uttan alt tað sjálvbodna arbeiði, sum eisini var gjørt í hesum sambandi, høvdu teir ongan møguleika havt fyri at fyrireika hesum, og takkaði hann fyri alla ta hjálp, sum var veitt HSF til dystirnar.



*Føroyski hópurin undan dystinum fríggjadagin: Aftast frá vinstru Palli Joensen, venjari, Rúni Poulsen, Bárður Brimvík, Sámal Joensen, Heini Joensen, Jóhan Danielsen, Áki Olsen, Daniel Rápa, hjálparvenjari og Jákup Durhuus, liðleiðari. Húkandi frá vinstru Hans Áki Dahl Christiansen, Bjarni Wardum, Eli Müller, Óla Kristian Djurhuus, Petur Martin Poulsen og Ingi Olsen. Har umframt vóru Jens Skipagøta, Janus Einar Sørensen og Martin Hummeland eisini við í hópinum.*



*Petur Ove Joensen, formaður í Hondbóltssambandinum*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

Fyriskipanina av tiltakinum var hann sum so eisini væl nøgdur við, men kortini helt hann, at talið av áskoðarum hevði verið dekan ov lágt. Sjálvur helt hann, at hetta partvíst var orsakað av, at dystirnir vórðu leiktir á føstulávint, tá fólk kanska hava annað enn hondbólt í huganum, men eisini viðgekk hann, at teir kanska høvdu gjørt heldur lítið til tess at marknaðarføra dystirnar.

Hetta eru tó alt viðurskifti, sum til ber at betra um komandi tíðina, og Petur Ove var heldur ikki í iva um, at teir høvdu lært nógv av hesum dystinum.

**Komandi tíðin**

Spurdur um, hvat vit kunnu vænta viðvíkjandi A-landsliðnu komandi tíðina, segði formaðurin, at sum er, eru ongar fastlagdar ætlanir fyri komandi tíðina.

Ætlanin er at luttaka í HM-undankappingini, sum verður í januar mánaði komandi ár, men burtursæð frá hesum, er einki konkret á skránni enn. Arbeitt verður tó við at fáa onkrar venjingardystir í august ella september mánaði, umframt at tað eisini er ætlanin, at landsliðsleikararnir skulu vera saman við jøvnum millumbilum.

Eisin nevndi hann, at bæði grønlendingar og føroyingar vóru áhugaðir í einum víðkaðum samstarvi, á landsliðsøkinum, so talan eisini í framtíðini kann gerast um venjingardystir móti grønlendska liðnum, bæaði hjá kvinnum og monnum.

**Nakað at byggja á**

Hvussu verður og ikki við hesum, so er einki at ivast í, at hondbóltsáhugaði føroyingarnir ganga eini spennandi tíð á møti, nú gongd aftur er komið á landsliðið.

Dystirnir móti Grønlandi prógvaðu so avgjørt, at leikaratilfarið er á eini góðari leið, og veður lági meðalaldurin á liðnum havdur í huga, er púra greitt, at stórir møguleikar eru í ungu leikarunum.

Spurningurin er so, hvussu hesir kunnu mennast enn meira, og á tann hátt tæna føroyskum hondbólti best gjørligt.

## Gott grundarlag

*Millum áskoðararnar til dystin fríggjadagin var fyrrverandi landsliðsleikarin, Kári Mortensen*

JÁKUP MØRK

Í nógv ár hevur Kári Mortensen verið millum fremstu leikararnar her á landi, og hóast hann nú er vorðin 45 ár, so er hann framvegis ein av týdningarmestu leikarunum á neistaliðnum, sum hetta kappingarárið er partur av gullstríðnum í bestu mansdeldini.

Eftir dystin hittu vit Kára, og spurdu vit hann, hvat hann helt um avrikið hjá føroyska liðnum.

**Spennandi tilfar**

Fyrrverandi landsliðsleikarin helt, at munurin millum liðini bæði var rættuliga stórur hendan fyrsta dystin.

- Ta einu løtuna kundi ein kanska verið bangin fyri, at munurin fór at gerast ov stórur, men tíbetur komu grønlendingar við aftur í dystin, helt Kári.

Eisini helt hann, at tað var rættuliga stórur munur á spælinum, sum tey bæði liðini sýndu.

- Grønlendingarnir leiktu nógv skjótari og meira tekniskan hondbólt enn okkara menn, sum í nogv størri mun spældu upp á skot- og kropsliga styrki.

Annars helt hann sjálvsagt, at tað var at frøast um, at vit aftur høvdu eitt A-landslið, og hann ásannaði eisini, at tilfarið á liðnum sá spennandi út. Serliga tá lági aldurin verður havdur í huga.

